


# Stanley við nýggjari fløgu

**Stanley Samuelsen hevur givið nýggja fløgu út, ið nevnist Sól og Regn**

TÓNLEIKUR

*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Stanley Samuelsen er aftur fløgutøkur og hesaferð eitur fløgan Sól og Regn. Tá hann fyri nøkrum árum síðani gav út fløguna “Um eg kundi kvøðið”, gjørdist hon væl umtókt og fleiri hava óivað bíðað eftir næsta útspælinum.

Sagt verður um fløguna, at her ein norðurlendskur grundtóni av nútíð og tíðarloysi. Sól og regn eru eisini grundleggjandi lívstreytir og eru lívstreytirnar tráðurin, ið bindur tey 14 løgini saman.

Stig Kreutzfeldt hevur verið tónleikaligur framleiðslustjóri og Tutl gevur út.

Stanley hevur sjálvur gjørt flestu av løgunum og eigur eisini orð. Aðrir yrkjarar, ið eru á fløguni, eru Viggo Johannessen. Mikkjal á Ryggi, Chr. Matras og Andras Samuelsen. Flestu sangirnir eru á føroyskum, men einstakir eru á donskum, svenskum og enskum.

## Úrvals tónleikarar

Tónleikararnir á fløguni eru royndir. Stanley spælir allar guitarar. Gert Smedegaard spælir trummur og Knut Henriksen bass. Báðir eru kendir á danska pallinum og hava spælt við m.ø. CV Jørgensen, Rugsted & Kreutzfeldt og Cornelis Vreswijk.

Claus Christensen spælir tangentar, mandolin og banjo, harmoniku og annað og Stig Kreutzfeldt spælir m.a. tangentar.

Guðrun Sólja Jacobsen setir eisini dám á fløguna við kórsangi.

Íblástur til orð og løg já Stanley kemur úr føroyskum umhvørvi og íblástur frá stóru guitarhetjunum í seksti- og sjeytiárunum er eisini til staðar, verður sagt í tíðindaskrivi.

Teksthefti er við fløguni við øllum tekstum og har er eisini ein stutt lýsing á enskum av yrkingunum.

Lesið Sosialin -so eru tit við!

Sosialurin
Sosialurin
i




**Skái uttan skuldarkenslu**

Eydnan er ikki altíð bara við endan á tunlinum; tað skal eisini bera til at njóta lívið á stundum møðsomu leiðini til munnan. Við hesum í huga bjóðar Føroya Banki sethúsakundum at velja sær skáa onkrastaðni í lánstíðini.

Men hetta er eingin vanligur skái. Velur tú at fáa ella leggja um til SkáaLán, fært tú eina munandi rentulækking við í keypið.



**Støkk inn á gólvið og fáa eitt skáaprát við ráðgeva tín í Føroya Banka. So fært tú sjón fyri søgn um, at vit geva tær betri ráð!**

FØROYA BANKI
www.foroyabanki.fo